# Melkøya byrjar fra

**- Í Føroyum verður alt ov nógv hugsað um kostnað, tá talan at geva fólki ein førleika til arbeiðið sítt.**
**- Í Noregi er munandi øðrvísi: Ynskja fólk innan oljuvinnuna at fara á skeið, ja so sleppa tey! Á henda hátt fáa tey økta vitan og verða betri før at loysa uppgávurnar, sigur Hans Jákup Johannesen, sum er álitismaður hjá føroysku elektrikarunum sum arbeiða á Melkøya.**

OLJUVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Melkøya:** - Vit í Føroyum eru eftirbátar á hesum øki. Vit, sum arbeiða í Noregi síggja hvønn dag, hvussu neyðugt tað er at fólkini eru væl útbúgvin, sigur Hans Jákup, sum er ættaður av Skála.

Hann hevur verið ein av teimum mongu føroyingunum, sum hava arbeitt á norsku gassoynni Melkøya í Norðurnoregi.

Ynskið hansara hevur verið – og er – at føroyingar kunnu standa so væl tilbúnir sum yvirhøvur gjørligt, um og tá farið verður undir eina føroyska oljuvinnu.

Hans Jákup er sannførdur um, at slíkt kemur ikki av sær sjálvum. Neyðugt er allatíðina at fyrireika seg optimalt, við at útvega føroyingum royndir og førleikar innan hesa vinnuna í øðrum londum.

- Okkara ynski er, at tey føroysku handverkarafeløgini, sum senda limir sínar til Noregs, seta seg meiri inn í teir norsku sáttmálarnar.

- Á henda hátt kunnu vit fáa somu rættindi sum norsku starvsfelagar okkara, og soleiðis kunnu okkara viðurskifti verða skipað á besta hátt, sigur Hans Jákup.

## Ein vinna til framtíðina

At Hans Jákup yvirhøvur kom í samband við Melkøya, kann hann takka øðrum monnum fyri, sum høvdu verið har áður.

- Eg hoyrdi aðrar tosa um Melkøya, og tað ljóðaði áhugavert í mínum oyrum. Eg hevði so einki ímóti at fara undir nýggjar avbjóðingar har yviri, sigur hann.

Hann visti lítið um PAM Offshore Service og fyrireikingarnar á Melkøya tá. Men ein telefonsamrøða við táverandi fyrisitingarleiðarin, Gunvør Balle sannførdi hann um, at hetta eisini var nakað fyri hann.

Tíðspunktið fyri hesi samrøðuni var rættiliga væl valt: PAM var júst um hetta mundið í ferð við at økja um virksemið sítt á norskari jørð.

Felagið hevði stutt framanundan fingið eina avtalu í lag um at økja virksemið sítt á hesum staði, har eitt stórt gassanlegg var í gerð. Her var stórur tørvur á elektrikarum, eisini úr Føroyum.

> **Frá at hava verið ein lítil og óbygd oyggj tey seinnu árini, er Melkøya í dag vorðin til mest útviklaða móttøkustaðið og reinsianleggið fyri gass úr Snøhvit-feltinum.**

Tá møguleikin beyðst, vóru tað beinanvegin fleiri mans ið sóu ein møguleika at fara inn í eina vinnu, sum teir og mong onnur vóna fer at taka seg upp her á landi.

## Gassverkætlan

PAM Offshore Service er eitt dótturfelag hjá skipasmiðjuni í Havn og varð stovnað í 1998.

Endamálið var stutt sagt at veita mekaniskar, elektriskar og sveisitænastur til oljuvinnuna.

Felagið fekk samstarv í lag við Aker Maritime í Noregi, og tey næstu fýra árini vóru regluliga millum 10 og 15 føroyingar í starvi í oljuvinnuni í Noregi.

Fyri sløkum trimum árum síðani eydnaðist aftur at fáa samstarv í lag um at fáa fólk í arbeiði. Hetta var í sambandi við stóru gassverkætlanina á Melkøya, ið liggur beint uttanfyri Hammerfest.

Aker Stord og Aker Kvaerner Elektro fingu her ein stóran sáttmála, ið innibar at eitt stórt tal av m.a. sveisarum og elektrikarum skuldu arbeiða í hesi verkætlan tey komandi árini.

Her varð tíbetur eisini brúk fyri arbeiðsmegi úr Føroyum.

## Nærum liðugt

Síðani arbeiðið byrjaði av álvara hava nógvir føroyingar brúkt kunnleika og handverk sítt sum sveisarar og elektrikarar í ymiskum




*Einki verður spart uppá trygdina á Melkøya. Her eru teir tríggir føroyingarnir – vinstrumegin Magni Dam, Eyðun Petersen og Eyðun Gaardbo - í ferð við eina trygdarrundu. Eyðun Petersen og Hans Jákup Johannesen hava ábyrgd av hesum arbeiðinum*

Sosialurin